Álit

í

løgtingsmáli nr. 55/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll (Nýtt vørunummar í toll- og vøruskránni til Prima snús)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 2. desember 2025, og eftir 1. viðgerð 4. desember 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 10. desember 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Nevndin hevur hesar viðmerkingar:

Í sambandi við løgtingsmál 18/2025, ið hækkar avgjøldini á snús og tubbak, hevur tað víst seg, at broytingin hevur sera stóra ávirkan á leyst snús, ið vanliga verður brúkt í Føroyum (Prima snús). Fyri at kunna taka nakað av avgjaldshækkingini av hesum snúsinum uttan at ávirka annað snús, er neyðugt at nágreina vøruna.

Í verandi toll- og vøruskrá er snús býtt í tvey.

2403.99.30 — Snus med indhold af tobak
2403.99.40 — Snus uden indhold af tobak

Leyst snús, sum Prima snús, kemur tí undir fyrra bólkin, sum er snús við tubbaki. Í sama bólki er eisini annað snús í posum, sum líkist øðrum snúsi uttan tubbak.

Endamálið við lógaruppskotinum er at kunna skilja leyst tubbakssnús, sum Prima snús, frá øðrum snúsi. Vørubólkurin er smalt orðaður, so at fleiri vørur ikki skulu sleppa inn í vørubólkin. Talan er tískil um ein undirbólk til 2403.99.30 í verandi lóg.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 12. desember 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	